Katrin í Gongini:

# – Lær at liva við Ayur Veda

**At breiða kunnleika um indisku filosofiina »Ayur Veda« er fyrsta tiltakið hjá verkstovuni Gongin, sum Katrin í Gongini hevur tikið stig til**

SKEIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Katrin í Gongini var í 17 ár stjóri í mótahandlinum Klivanum í SMS. Nú eru mótaklæðini løgd á hyllina, og í staðin hevur hon stovnað eina verkstovu, sum setirheilsu og rivnað hjá fólki í fokus.

Fyrsta skeiðið er um Ayur Veda, sum er aldagomul indisk filosofi um, hvussu tú fært eitt langt, heilsugott og lukkuligt lív. Skeiðshjaldari verður danin, Dr. Lærs Martiny, sum hevur undirvíst í Ayur Veda í 30 ár. Hann er upprunaliga útbúgvin tannlækni, men fekk sær tíðliga Ayur Veda læknaútbúgving afturat og hevur undirvíst bæði lærdum og leikum síðani. Hann var í 12 ár lærari og skúlastjóri á Rørvik Folkehøjskole, sum hevur gjørt tilvitsku og lívsfatan til sína sergrein.

Ayur Veda - heilsa og persónlig menning gjøgnum innlit í lívið - er ein indisk heilsuskipan. Hon er vorðin partur av lívinum hjá nógvum fólkum kring allan heimin, og rættiliga nógvir læknar í vesturheiminum hava tikið við hesari náttúrligu læruni, ið sær sjúklingin sum eina heild. Sambært Ayur Veda er góð heilsa tað natúrliga; sjúka íkemur við at skeikla náttúrligu javnvágina.

– Beinleiðis umsett merkir Ayur Veda »lívsins vísind«. Í strembanini eftir at fremja heilsu og persónliga menning, tekur læran øll sjónarhorn við: Kroppin, sinnið, um hvørvið og tað andaliga. Øll hesi økini ávirka okkara lív og lívsgóðsku, og Ayur Veda gevur okkum eitt yvirlit, sum bæði er lætt at skilja og brúka í gerandisdegnum, sigur Katrin í Gongini.

– Skeiðið gevur luttakarunum eitt spennandi og undirhaldandi innlit í hesa sera viðkomandi vitan um lívið, har dentur verður lagdur á at skilja seg sjálvan betur og at sleppa undan óneyðugari sjúku og strongd. Haraftur hjálpir skeiðið við at fáa eyga á alt tað vakra í lívinum og ónýttu møguleikarnar, sum liggja og bíða eftir okkum, sigur Katrin í Gongini.

Skeiðið um Ayur Veda verður 29. oktober á Hotel Føroyum. Tilmeldingin verður lýst seinni.



*Eftir at hava rikið mótahandilin Klivan í SMS í 17 ár, hevur Katrin í Gongini nú stovnað verkstovuna Gongin, og verður fyrsta tiltakið hjá henni at breiða út kunnleika um indisku filosofiina »Ayur Veda«*

*Mynd: Dagny Joensen*

## Rútmiskur tónleikaverkstaður á Gjáargarði

Leygardagin verður rútmiskur tónleikaverkstaður á Gjáargarði. Har vant verður saman og arbeitt verður við egnum verkum. Umframt føroyskar tónleikalærarar og snillingar luttekur eisini norski gittarleikarin Odd-Arne Jacobsen.

Tiltakið er fyri allar áhugaðar rytmiskar tónleikarar. Tónleikararnir hittast á Gjáargarði kl. 15 leygardagin, og arbeiða saman inntil kl. 19.30, tá dagurin endar við konsert og jammsession.

Føroyska luttøkan fer m.a. at telja so mætar føroyskar tónleikarar sum Edvard N. Debess, Heðin Z. Davidsen og Kristian Blak. Tað eru Felagið Føroysk Tónaskøld og Føroya Jazztónleikarafelag sum skipa fyri verkstaðnum.

Kristian Blak sigur, at tey hava ofta hildi tílíkar verkstaðir fyrr, men hetta hevur altíð verið í Havn. Hesuferð royna tey Gjáargarð, tí hølini eru so framúr væl egnaði til tiltakið.

Nærri fæst at vita hjá Kristian Blak á tlf. 225034, og meldast skal til innan fríggjadagin kl 12.00

Til ber at gista á Gjáargarði fyri kr. 200.

**nud**

## Stuðla tiltøkum móti rúsdrekkamisnýtslu

RÚSDREKKA-MISNÝTSLA

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur sett í gildi eina reglugerð um stuðul til "Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu". Endamálið er, at játta feløgum stuðul til upplýsandi og fyribyrgjandi virksemi móti rúsdrekkamisnýtslu.

Stuðul verður ikki latin til stovnar og feløg, sum fáa eina játtan á fíggjarlógini til sama endamál og ikki til kommunur. Umsóknirnar um stuðul skulu skrivast á oyðublaðið, sum er ætlað til endamálið. Oyðublaðið og reglugerðin eru at finna á heimasíðuni hjá Almannaog heilsumálaráðnum www.ahr.fo og kunnu eisini fáast við at venda sær til ráðið.

## 36 vikur við vevlistanum

VEVMÁTING

*Jákup Mørk*

Vevmátingarlistin hjá Gallup hevur nú verið virkin í 36 vikur. 40 síður eru higartil skrásettar á listanum.

Frá fyrsta degi hevur tað verið olivant.fo, sum hevur verið ovasta síðan á netinum. Í viku 35 setti síðan eisini met við yvir 548 túsund sýndum síðum. Eitt tal sum í farnu viku fall eitt vet niður á stívliga 544 túsund sýndar síður. Talið av brúkarum á olivant setti eisini met í viku 36 við 27.471 brúkarum.

Dimma.fo og uf.fo eru sera støðugar á listanum og eru á 5. og 6. plássi við meira enn 4.000 brúkarum á hvørjari síðu.

Kvinna.fo er á 7. plássi við 3,152 brúkarum og er tað met hjá kvinna.fo higartil. kall.fo hevur eisini met við 3.054 brúkarum.

nordlysid.fo hevur havt nakað minni tal av brúkarum síðani summarfrítíðina, men hevði yvir 3.000 brúkarar í seinastu viku, sum er nakað tað sama nordlysid.fo hevði áðrenn summarfrítíðina.

Vevmátingarlistin hevur leinkju á olivant.fo, og við at trýsta á hesa sæst fullfíggjaði listin.

BYGGIBÚÐ
damor



998,-

Amboðsvognur
v/ 2 skuffum og 1 skápi
Alt kann læsast.
3 modul



789,-

ACO drive drain
Økonomiskt og funktionelt
Rist til tann føroyska handymannin
3m



einans 149,-

Nógvar límtræshillar eru at velja í
18 mm, í góðari góðsku
T.d. 40x200



einans 149,-

Alpha tools akku bori/skrúvi maskina
- 14,4v
- 1,3 ah
- Ladar 3-5 tímar
- Patrón ø10 mm

149,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor